## DAGSINS MEINING

# Valaverk

Í gjár kom  út bók um listamannin Trónd Patursson eftir danska listasavnsvørðin Finn Termann Frederiksen. Bókin, eitt satt valaverk, er tann fyrsta royndin at geva eina samanfatandi mynd av listarligu avrikunum hjá Tróndi. Bókin fylgir, sum tikið verður til í fororðunum, listarligu menning Tróndar frá fyrstu royndunum við málningum og høggmyndum til tey verk, ið hann skapar í dag. Høvundin leggur doyin á at seta listamannin inn í eitt føroyskt menningarhøpi og at vísa á hansara viðurskifti við altjóða listaumhvørvið. Í hesum sambandi er eitt aðalmál við bókini at finna fram til listamannsins listarligu mál og miðlar eins og til hansara lívs- og náttúrufatan og til tey átrúnaðarligu virði, ið  mynda støðið undir list hansara.

Bókin um Trónda Patursson er ein mentanarlig stórhending, sum prógvar, at Tróndur er listamaður á høgum altjóða støði. Tróndur er avgjørt høgt í metum bæði sum málari og sum myndhøggari. Hann er gitin fyri sínar glasmálningar og síni kosmisku rúm, har hann arbeiðir við glasmálningum og spegilstøkni. Tróndur er, sum víst verður á í bókini, eitt av høvuðsnøvnunum í tí endurnyggjan av føroyskari list, ið byrjaði við Ingólvi av Reyni. Hann hevur sostatt ein týðandi lut í menningini av føroyskari nútíðarlist.

Men bókin er ikki bert ein lýsing av Tróndar listarligu starvsleið. Hon fevnir um  hansara lívssøgu: Hesir partar ikki minni áhugaverdir, við tað at teir geva lesaranum eina mynd av einum sonnum ævintýrara, ið ikki minni sjey ferðir hevur verið á ferðum um øll heimsins høv við gitna ævintýraranum Tim Severin. Men bókin er annað og meira enn ein bók um Trónda, hansara list og lívsleið. Hon er enn eitt dømi um ta menning og tann gróður, ið er innan alt, sum eitur føroyska myndlist. Henda listagrein er rokkin altjóða støði eins og tónlistin og bókmentir okkara. Listafólkini eru eins og ítróttafólkið okkara bestu ambassadørar úti í heimi, og vit hava allar góðar grundir til at vera fegin um og errin av hesum fólkum. Tey eru landi og fólki til miklan heiður. Tillukku.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lógin má vera eins báðar vegir

**– skulu kommunur gjalda fyri væntandi barnaansing, so má landið eisini gjalda fyri væntandi ansing av teim eldru**

**Jan Danielsen**



Enn einaferð eru vit vitni til, at Føroya Løgting ger lógarbroytingar, sum kosta kommununum pengar, mitt í einum roknskaparári. Tá so fíggjarætlanin hjá kommunum ikki verður yvirhildin, fær kommunan eina átalu fyri tað.

Hoyrdi í tíðindunum í áðni at Føroya Løgting nú hevur samtykt við 3. viðgerð, at kommununar skulu gjalda fyri væntandi barnaansing, tí hetta økið nú er lagt út til kommununar.

Um hetta verður lagið framyvir, so eru kommununar og kommunufeløgini noydd til alt fyri eitt at forða landinum í at leggja fleiri økir út til kommununar.

Lógin má virka líka báðar vegir: Skulu kommunurnar fáa rokning fyri væntandi barnaansing frá landinum, so má landið fáa rokning frá kommunum fyri tann partin av eldrarøktini, sum landið ikki er maður fyri at røkja – og tann parturin er rættuliga stórur.

# Brot úr brævi (IV)

**- ein stuttlig søga**

**Heri Mohr**



"….. Eg havi greitt tær frá tí sindrinum, sum er farið fram í mínari verð síðan mítt seinasta bræv til tín, og fari eg tí at enda við tøkk til Hann, ið øllum valdar, tí at alt tykist at ganga tann rætta vegin hjá tær har á sjúkrahúsinum, hóast tú eftir øllum at døma skjótt verður fluttur á specialhospital einastaðni ikki langt frá Ríkishospitalinum.

Kærar heilsur frá okkum 5
**Kona tín**

P.S. Nú mundi eg gloymt  at fortelja tær, at Pætur var her fyrrakvøldið. Í góðum lag sum altíð. Vit prátaðu um mangt og hvat, men hann var ikki meira enn komin inn um gáttina, so segði hann: - Tú, trímenningurin, nú stendur í "Dimmu", at eg eri komin til ta niðurstøðu, at Sjúrður Skaale er rasistur. Tú minnist hetta kvøldið, tá eg segði við teg, at hesu seinastu árini høvdu vit upplivað so nógv, sum ikki sampakkar við føroyska psyku og mentan, og at tað, sum eitt blað hevði skrivað um ein fund í Hósvík, fekk meg at siga tað einsamalla orðið rasisma. Men navnið Sjúrður Skaale kom ikki yvir mín munn og hvaðna minni nøkur niðurstøða um tann mannin, sum hevur so frálíkt hegni at fáa fólk at flenna. Hann hevur kanska lisið við brillunum hjá einum ávísum Esmari? Eg minnist eisini, at eg segði, at vit føroyingar skulu vara sálina, tí eingin friðardúgva kann trívast hjá teimum, ið lúgva. Um hetta eri eg sannførdur meira enn nakrantíð. Orðatakið: Hann er sekur, ið at sær tekur, er viðhvørt beinrakið.

Hoyrdi  í gjár, at annar av okkara fólkatingslimum skal halda flaggdagsrøðu á Regensinum í Keypmannahavn - á donskum.

Pætur tagdi og stardi eina góða løtu: - Tú, Malan, løgið er tað, men í nátt droymdi eg, at eg var á Garði og skuldi halda eina røðu á donskum . Nógv fólk var har, - eg kendi ongan, - og framman fyri talarastólinum stóð manskórið "Høgna Garpar" allir í myrkamorreyðari troyggju, og dirigenturin í knæbuksum, stavnhettu og í húðaskóm. Hevði lítlan fjallstav í hondini at dirigera við. Teir veitraðu allir við pappírsfløggum. Í Købmagergade gingu tvey konufólk í føroyskum búna við stórum skelti:
"Syng med i Sangforeningen Høgnes Gutter,
så det dutter.
Hansen såvel som Jensen
hen om hjørnet i Regensen."

Komin á røðarapallin varð eg varur við, at eg hevði gloymt manuskriptið, men tá komst tú óvæntað úr mannarúgvuni upp á røðarapallin og teskaði mær í oyrað, at eg dugdi betur at tala uttan handrit. Bjargaður var eg, og tú hvarv. So byrjaði eg taluna:

Kære tilhørere.

Nostalgiske drømme formerer sig i takt med alderen. Har man passeret støvets år og lever på, om jeg så må sige, lånt tid, kan disse retrospektive drømme være såvel plage som velsignelse. Vi vil dvæle ved velsignelsen. På Færøerne er det således, at når barndommen er vel overstået,  og ungdommen med forsigtighed aner tilværelsens alvor, får den en langsom, snigende karakter af indestængthed, og ud vil den, ungdommen, ud over de høje fjelde, over det sortladne hav. Mange unge begynder deres livsgerning ude på havet, og atter mange "fara niður", hvilket er synonymt med at rejse til Danmark til skolegang og faglig og boglig uddannelse.

Her i Regensen eller "á Garði", som det hedder i den færøske studenterverden, er mange færinger blevet beåndet med færøsk, dansk, europæisk kultur, og flere af dem har sat dybe spor i humanismens og kulturens verden, de har mejslet sig fast i bevidstheden ikke blot på Færøerne og Danmark, men viden om i verden, hvor europæisk kultur har vundet indpas. Vi kan her nævne nogle af dem: Jacob

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax  314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ársfrágreiðing 2002-2003

**Føroya Náttúruverndarfelag – FNU**
*Kári Thomsen, formaður.*

Aðalorðaskifti var í februar farna ár í Løgtinginum um náttúru- og umhvørvisvernd, har víst varð á tørvin á nýggjari náttúrufriðingarlóg og endurskoðan av umhvørvislógini. Serstakt varð víst á tørvin á at tað má verða landsstýrið, ið fær evsta myndugleika í øllum náttúrufriðingarmálum. Eyðun Eltør, landsstýrismaður hevur sett arbeiðsbólk at orða nýggja náttúrfriðingarlóg.

Eftir kanning av dálkingarstøðuni kring brennistøðirnar staðfesti Heilsufrøðiliga Starvsstovan at dioxinnøgdin í seyði var væl størri her í mun til í økjum langt burturi frá brennistøðunum. Úrslitið bleiv at Starvsstovan setti krøv um uppsetan av filtrum til reinskan av roykinum og at hesi skulu verða sett upp innan ávísa freist.

Føroya Nátturuverndarfelag skipaði fyri Orku- og Umhvørvisráðstevnu í Norðurlandahúsinum 2 og 3 mai har verandi støða bleiv gjølliga lýst av føroyskum luttakarum umboðandi SEV, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, IRF, o.ø. og innbodnir útlendingar hvør við sínari sergrein innan vindorku, sólarorku, brennikyknur og biogassskipanir vístu á hvussu gongdin var aðrar staðir. Íslendingar høvdu umboð frá Altinginum og felagið VistOrka segði okkum frá teirra ætlanum innan geotermiska orku og framleiðslu av brennievninum vetni til flutning á landi og sjógvi. Ráðstevnan kundi m.a. staðfesta at SEV nú hevði tikið til eftirtektar av vindorka eisini varð ein møguleiki her hjá okkum.

Í summar kom fram at Tórshavnar Skipasmiðja hevði útlát av tungmetallum, ið m.a. stavaðu frá skipsmálingini, og at afturvendandi oljudálkan av vánni var ein stórur trupulleiki.

Sílaveiðufelagið hevur vakið eyga vit umstøðunum í og kring vøtnini við Leynar og í Saksun, og kærdi bóndan í Leynum fyri friðingarnevndina tá grevstur var framdur fram við ánni, ið rennur úr Leynavatni. Staðfest var at hetta ikki kundi góðtakast sambart friðingini av økinum og at viðurskiftini skuldu setast aftur í uppruna stand.

Landsstýrið tók avgerð at seta á stovn Agenda 21-skrivstovu, ið skuldi vera ráðgevi hjá kommununum. Fleiri kommunur søgdu seg vilja hýsa skrivstovuni, ið ikki er sett á stovn enn, mest vegna innanhýsis klandur um hvar henda skal verða.

Annar ST- fundurin um fátækradømi og burðardygga menning varð hildin í Johannesburg og vóru Føroyar umboðað sum partur av donsku sendinevndini.

Úrslitið var heldur soltið einamest tí m.o. USA ikki vildi ganga krøvunum um minking av vakstrarhúsgassum á møti, og somuleiðis máttu vit herheima staðfesta at landsstýrið heldur ikki vildi taka undir við Kyoto-ískoytissáttmálanum við grundgevingini at vit ikki kendu dálkingarstøðuna.

Kanning bleiv síðan sett í verk og vísti úrslitið, at vit í 1995 lógu triðovast á listanum fyri útlát av vakstrarhúsgassum. Mikið rumbul er íkomið av hesi vána støðu, og enn hevur landsstýrið so ikki lagt fram nakað miðvíst, ið kann minka um dálkingarnøgdina. Sambært Kyotoavtaluni skulu vit minka okkara part við 5% inntil 2012 grundað á útlátið í 1990.

Hildnir eru 4 nevndarfundir síðan seinasta aðalfundin. Hin 25.mai og 14. desember 2002 og 5. februar og 19 marts í ár. Serstøk mál, ið nevndin hevur viðgjørt eru gamla málið í Sandvíkum, ið opinbart er endaligt avgreitt. Málið hevur verið til kanningar hjá løgtingsins umoðsmanni, ið sigur seg ikki kunna viðgera fyrisitingarlig mál uttan fyri heimastýrislógina. Yvirfriðingarnevndin er eftir hesum at døma uttan fyri føroyska fyrisitingarlóggávu, men undir danska dómsvaldinum og løgmálaráðnum.

Annað mál er friðing av mølini í Fámjin. Yvirfriðingarnevndin sigur í niðurstøðuni frá 30. januar í ár, at ein samd nevnd staðfesti úrskurðin hjá friðingarnevndini fyri Suðuroyar sýslu, at "friðing av felagsmølini – strondini – í Fámjin, ikki verður gingin á møti". Sagt verður, "at umrødda tøka av gróti úr strondini í Fámjin, ikki skemmur natúruna og heldur ikki ger nakran skaða. Nevndin er samd, at talan ikki er um sermerkt landslag, sum fer fyri skeyti, um nakað av malagróti verður tikið i mølini. Somuleiðis er nevndin samd, at umrødda økið ikki hevur vísindaligt ella søguligt virði, vakurleika ella sereyðkennir, og tí ikki kan friðast sambært § 6 í lóg nr. 48 frá 9.juli 1970."

Avgerðin er sera óheppin og kann hava við sær precedens í øðrum líknandi málum. Skriv kann sendast til kommununa, at hon sjálv tekur stig til at friða mølina. Hetta kann gerast sambært byggi- og býarskipanarlógini, har økið verður lagt út til "frílendi" og at serstakar treytir verða settar í byggisamtyktina.

Ársfundurin hjá norðurlendsku náttúruverndarfeløgunum varð í ár fyriskipaður av Danmarks Naturfredningsforening í vikuskiftinum 16. til 18. august.

Umsókn um stuðul til ferðina varð send Oljumálastýrinum, men ikki gingin á møti orsakað at freistin at søkja var úti 1. mars. Síðan varð umsókn send Norðurlandahúsinum, ið hevði lítla játtan tøka, og fingu vit har 2.700 krónur í stuðli.

Kári fór á fundin, ið varð skipaður við leigaðum bussi til Kastrup floghavn har tikið varð ímóti norðurlendsku umboðunum.

Leiðin gekk síðan suður eftir til Avnø og økið kring stórt vaðøki, har nógvur vað- og rovfuglur heldur til fyriuttan heilt nógvur kópur. Leiðin gekk víðari við ferju til Langeland har grunnurin Danmarks Naturfond undir Danmarks Naturfredningsforening eigur og rekur stóran harragarð nevndur Skovsgaard. Talan er um landbúnaðar- skógar- og strandaøki góðar 247 ha, ið verður rikið á reint vistfrøðiligum grundarlag. Forvitnisligt er at allar markir og skógarøki eru hegnað inni á gamlan hátt við livandi hegni, runnum og eikitrøðum. Eingin drening verður framd á markunum og alt verður hildið á treytum náttúrunar. Harragarðsøkið sigst verða eitt av størstu økjum, har alt enn er skipað í einum uppruna landbúnaðaranda.

Fundurin varð skipaður í tveimum har seinraparturin 16. august var hildin í stóra salinum á Skovsgaard, og annar parturin á Æbelø, ið er friðað oyggj norður úr Fyn.

Á Skovsgaard løgdu einstøku londini stutt fram um týdningarmikil mál og uppgávur síðan fundin í Íslandi.

Serstakt varð, at Grønland hevur fingið náttúruverndarfelagið UPPIK (snjóugla) sett á stovn.

Endamál felagsins er (í stuttum) at virka fyri vernd og burðardyggari gagnnýtslu av grønlandsku náttúru- og landslagsvirðunum. Formaðurin Jens Peter Lange greiddi m.a. frá, at trupult var at fáa folk at skilja týdningin í náttúruvernd. Fólk eru afturhaldandi fyri slíkari umhvørvisvernd og hómast enn nakað av tíðini frá Greenpeace og teirra aktivitetum í Grønlandi.

Aðrir trupulleikar eru partvís at bæði danskt og grønlendskt mál skal nýtast, og partvís at eingi fyrilit verða tikin fyri náttúrutilfeinginum. Nógvir og skjótir bátar eru til, nógvar byrsur, og alt verður skotið. Reinsdjórakvotur eru settar við tí úrslitið, at nógvur fuglur er skotin.

Við UPPIK eru nú náttúruverndarfeløg í øllum norðanlondum.

Evni, ið viðgjørd vóru a Æbelø var m.a. burðardygg menning og royndir frá altjóða og lokalum átøkum, samt felags stig í samband við fundin í Johannesburg.

Gjørt varð felags skriv, ið varð sent 19. august, til norðurlendsku umhvørvismálaráharrarnar, ið høvdu fyrireikandi fund í Trondhjem 21- og 22 august. Heitt varð a fundin at fremja nakað í verki, tá gjørdar eru greiningar, kanningar og frágreiðingar í ríkiligt mát. Stategiin "Nýggj kós fyri norðanlond" skal evaluerast fjóra hvørt ár, og skal hetta m.a. gerast sambært Århuskonventiónini við kunning til NGO-feløgini um hvussu framtíðar samstarv er ætlað.

FNU hevði fingið á skránna viðger av uppskoti, at norðanlondini Grønland, Ísland og Føroyar kundu skipast sum fordømi innan burðardygga menning, partvís vegna einháttaða støðu sum fiskivinnutjóðir og partvís at indnaðar- og búsetingarmynstrið var sambarligt - eftir geografisku umstøðunum. Uppskotið varð væl móttikið við áheitan at gera meira miðvísa ætlan til komandi fundin.

Landvernd hevði aftur frammi evni um viðger av trupulleikum í nýtslu av náttúruøkjum og økisnýtslu sum heild. Stórmálið hjá íslendingum er Kahranjúkarverkætlanin, og bleiv í tí sambandi gjørd felags samtykt, ið tók undir við niðurstøðuni hjá Statens Direktorat for Arealplanlegging, at verkætlanin ikki kundi góðkennast vegna stóra skaðan hetta vildi hava við sær á náttúruna. Niðurstøðan hjá stovninum bleiv seinri tileinkisgjørd av umhvørvismálaráðharranum og við fylgjandi undirtøku av Altinginum.

Norska náttúruverndarfelagið gjørdi uppskot til felagsskriv til mótmæli til Ensku stjornina, at man haðani í stundini gav boð um at steðga øllum útlátum at m.a. technetium-99 frá Sellafield. Radioaktiva dálkingin fer út í Norðsjógvin, fram við donsku, svensku og norsku strendurnar, og sæst eisini í Barensthavinum og á Svalbard. Evnið sæst m.a. í tara og skjeljadjórum og er fleirfaldað síðan 1994. Innihaldið er i løtuni yvir 600 bequerel fyri hvørt kilo (turrevni), ið er gott helvtin av nøgdini EU setur sum mark fyri innihaldinum í matvørum - eftir atomóhappi.

Áheitan varð eisini send norðurlendsku stjórnunum, at gera sítt til at leggja trýst á ensku stjórnina.

Åland Natur og Miljø greiddi frá vindorkuætlanum teirra. Sum er hava teir sjókaðal til meginøkið samt 12 myllur frá 500 til 600 kw hvør settar upp ymisk støð á oynni. Ålands Vindkraft arbeiðir við uppsetan av 7 off-shore myllum á 1800kw. Fíggjað er við m.a. nøkrum túsund anpartum har Vindkraft-felagið hevur tær uml. 1000. Góð 23% av orkuni verða tá framleidd frá vindi.

Norges Naturvernforbund tók fult undir við vindmylluuppsetan, tó at hetta skuldi gerast eftir skipaðum viðurskiftum.

Annað, ið havt var frammi, var m.a. at íslendskar kommunur hava sett upp lokal Agenda 21 verkætlanir.

Í Finlandi er vistfrøðin við at vinna fram. "Vistfrøðiligt fótspor", verður sagt um felags átekning ella merki, ið skal verða trygdin fyri um vøra er vistfrøðiligt framleidd.

Í Noreg hava góð 10.000 fólk sett bilin frá sær annan hvønn dag, og nýta tey tá súklu ella ganga. Hetta fyri m.a. at avmarka útlatið av vakstrarhúsgassum.

Fundurin var í allar mátar sera væl fyriskipaður og heppnaðist sum ætlað. Næsti fundur verður í Helsinki hjá Finlands Naturskydsforbund í døgunum 15-17 august 2003. Stuðul er játtaður 3.mars í ár uppá 9,950 kr til luttøku á fundinum. Havast skal í huga at Føroyar standa fyri at verða vertir ár 2004.

Onnur mál nevndin arbeiðir við er skipan av tjóðgarði, og eru tvey øki funnin annað norður/vestur Streymoy og annað Hvannhagi og økið haðani til Nes í Hvalba. Upgávan er arbeiðskrevjandi men tó eitt stig rætta vegin. Vøtnini eru uppmáld og væl av skrivligum tilfari finnist. Hugsað hevur verið um uppskot at friða øll vøtn i landinum.

Talan er um at fáa gjørt heimasíðu, ið má sigast at verða avgjørt uppá sítt pláss. Spurningurin er bert hvør tekur stig at gera nakað við málið.

Fleiri serstakar hendingar hava verið uppi og vent í fjølmiðlunum seinru tíðina. FNU hevur markera seg kanska meira enn vanligt í útvarpi, sjónvarpi og fjølmiðlum. Nevnast skal konstruktiva tiltakið hjá Erling Simonsen at konvertera bilin hjá sær til rapsolju, verkætlan til uppsetan av sólkyknum á Vestmanna skúla, og annars tiltøk millum fólk og skúlaungdóm at arbeiða meira miðvíst við umhvørvismálum. Vestmenningar arbeiða við uppsetan av vindmyllum, spillorka frá brennistøðini í Leirvík verður brúkt til turking, og aðrar skilagóðar verkætlanir eru í umbúnað.

Samanumtikið heppnaðist árið væl, men nógv meira orka og skipan av uppgávunum millum nevndarlimir eigur at verða nakað, ið skal takast í álvara, so mál og uppgávur ikki draga út í langdrag.

### Frá aðalfundinum 12.apríl

Nýggj nevnd varð vald og skipaði hon seg við Erling Simonsen sum formanni. Hinir nevndarlimirnir eru Eyðun Lauritsen, Saltangará, Brynjálvur Nattestad, Miðvágur, og Jóhan Christiansen og Hans Ellefsen, Tórshavn. Nýggir tiltakslimir eru Kári Thomsen og Oddmar J. Samuelsen, Tórshavn.

*Framhald av síðu 10*

Jacobsen, Niels R. Finsen, som trådte sine børnesko i Tórshavn og dér huggede sit navn i en klippe, Fredrik Petersen, Christian Bærentsen, Hammersheimb, J. H. O. Djurhuus, Jørgen-Frantz Jacobsen og flere.

De store færøske højskolemænd Rasmussen og av Skarði fik utvivlsomt deres åndelige og nationale vækkelse i den danske højskoleverden.

Det er ikke vanskeligt at vurdere den værdifulde mentale rigdom, højskolen, universitetet og andre læreinstitutioner samt Regensen har tilført færinger og det færøske samfund i, skal vi sige, 200-300 år.

Måtte Danmarks utømmelige kilder med europæisk kultur, humanisme, demokrati, national selvfølelse vedvarende være dragende og frit tilgængelige for os færinger, selv om vores nationale hals til tider kan afstedkomme ret så voldsomme hosteanfald.

Tá ið eg hevði sagt hetta, gjørdist ófriðarligt í áhoyrarafjøldini, og dirigenturin fór upp á røðarapallin og rópti: Hold så op med det bavl og sludder om velsignelse og forjættelse, og hvis du ikke har den smule høneforstand som forudsætter en forståelse af den ægte færøske fisks velsignelse, din torsk, så smid dit senile godtkøb over bord og gå hjem og vug.

Hann gav mær ein undir vangan við fjallstavinum, og so - vaknaði eg.

Snar stóð tá við báðum forbeinunum á songarstokkinum og sleikti mær um kjálkan, har sum eg í dreymi varð sligin.

Jú, Jógvan, Pætur er ein løgin snigil og eitt góðdýr."

**Kona tín**